# Stjóraskifti í Vinnuhúsinum

**Fríggjadagin 11. januar 2008 var móttøka í Vinnuhúsinum í sambandi við, at Marita Rasmussen er sett í starv sum stjóri frá 1. januar, og at Jan Mortensen er farin frá sum stjóri eftir 10 ár í starvinum**

MÓTTØKA
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Í sambandi við stjóraskifti í Vinnuhúsinum var skipað fyri móttøku seinasta fríggjadag, har nógv fólk stukku inn á gólvið at heilsa upp á nýggja og fráfarandi stjóran.

Marita Rasmussen hevur tikið við sum stjóri eftir Jan Mortensen, sum seinastu 10 árini hevur verið stjóri í Vinnuhúsinum. Hann er farin í starv hjá Føroya Tele sum stjóri í FT Samskifti, ið hevur um hendi menning, sølu og marknaðarføring av tænastum hjá fyritøkuni.

Marita er 40 ára gomul og útbúgvin fiskivinnufrøðingur á lærda háskúlanum í Tromsø í 1993. Umframt hesa útbúgving hevur hon eisini tikið Master of Management við Robert Gordon University í Aberdeen.

Seinastu trý árini hevur hon starvast sum samskipari í Vinnuhúsinum og serliga tikið sær av áhugamálunum hjá Ráfiskakeyparafelagnum, Havbúnaðarfelagnum og KF-felagnum.

Í eini tvey ár arbeiddi Marita sum samskipari í Vinnuhúsinum, og hon hevur eisini arbeitt í Fiskimálaráðnum. Av øðrum starvsroyndum kunnu nevnast, at hon hevur arbeitt við sølu- og marknaðarføring av alifóðuri, hevur verið samskipari innan fiskivinnugransking, og arbeitt sum ráðgevi og verið góðskuleiðari hjá Føroya Fiskavirking.

Marita Rasmussen segði m.a. í røðu síni at Vinnuhúsið er í dag ein aktivur luttakari í føroyska kjakinum, umframt at tað luttekur í at tillaga føroyskar vinnukarmar til framtíðina - tað fara vit framhaldandi at gera. Vinnufeløg, sum umboða aðrar vinnur enn tær traditionellu, eru løgst afturat m.a. KT-vinnuna og reklamuvinnuna - og er tað sera gott.

Vinnuhúsið fer framhaldandi at leggja dent á at vera savnandi fyri alla føroyska vinnu. Tí ynskja vit, at enn fleiri arbeiðsgevarar koma við í Vinnuhúsið. Hetta fyri at fáa eina enn sterkari vinnurødd, segði Marita Rasmussen.

mg



*Nýggi stjórin í Vinnuhúsinum Marita Rasmussen og fráfarandi stjórin Jan Mortensen*



*Hákun Djurhuus SEV-stjóri, Oddfríður Gregersen, fyrrverandi formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag , og Janus Petersen stjóri í Føroya Banka*



*Lena L. Mohr og Rani Nolsøe*



*Tróndur Djurhuus, Hannes Gislason og Bjørt Samuelsen*



*Kristian Davidsen, stjóri á Føroya Tele, og Leif Abrahamsen, stjóri Føroya Gjaldsstovu*



*Marita Rasmussen og Elin Heinesen, stjóri í SamVit*

Min älskade Make
Min snälla Pappa
Vår kloke Bonusfar
Vår käre Son, Bror
och Morbror

Fuat Deniz

* 15 augusti 1967
har hastigt lämnat oss
i oerhörd sorg och
livslång saknad.
Örebro 12 december 2007

RÚNA
EMILIA
Jakob och Karin
Jonatan
Seve och Murat
Etina och Mark
Maddoc
Vivianne
Berolin och Ninos

*Mindre ivrig än vinden är jag, ändå måste jag fara. Vi vandrare, som ständigt söker den ensliga vägen, börjar aldrig en dag där vi slutar den föregående. Ingen soluppgång finner oss där solnedgången lämnade oss. Medan jorden sover, färdas vi. Vi är frön av en klängande växt, och det är först i vår mognad och i vårt hjärtas fullhet, som vi överlämnas åt vinden och sprids.*

Begravningsgudstjänsten äger rum i Olaus Petri kyrka, Örebro tisdag 22 januari kl 12. Därefter inbjudes till minnesstund på Restaurang Kraka, Örebro universitet, med början kl 15. Tänk gärna på Fuat Deniz minnesfond bg. 241-8770. Vid frågor gällande begravningen ring Fonus Örebro tel 019-13 00 45.

**Dagurin**
**16. januar. Marcellus**, deyður ár 309. Varð kosin til páva í árinum 307